# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Støðan á fíggjarmarknaðinum er álvarssom, men mín stjórn er til reiðar at taka sær av avbjóðingunum*

*George W. Bush*

## Rok í ísraelska stjórnarflokkinum

**Shaul Mofaz, sum tapti formansvalið í Kadima-flokkinum, hevur valt at taka seg burtur úr politikki fyribils**



*Shaul Mofaz og Tzipi Livni undir atkvøðugreiðsluni um formanssessin í Kadima*
*Mynd: Polfoto*

Shaul Mofaz var flutningsmálaráðharri í stjórnini hjá Ehud Olmert, og sambært ísraelsku fjølmiðlunum hevði hann ætlað sær uttanríkisráðharrasessin, um Tzipi Livni, uttanríkisráðharri, vann formansvalið í Kadima. Tað gjørdi hon, men samstundis kom fram, at hon hevði ongan hug at lata sín kappingarneyta umsita uttanríkispolitikkin.

Í gjárkvøldið boðaði Shaul Mofaz frá, at hann hevði sagt stjórnarsessin frá sær, og at hann eisini er farin úr tjóðartinginum fyribils. Ísraelsku bløðini skriva, at Tzipi Livni hevði ringt til hansara fleiri ferðir fyri at fáa hann at broyta avgerðina, men at hann vildi ikki tosa við hana.

Politiskir eygleiðarar í Ísrael siga, at Shaul Mofaz var sera vónsvikin av, at hann tapti formansvalið í Kadima, og viðhaldsfólk hansara leggja nýggja formannin og hennara stuðlar undir valsvik. Livni fekk 431 atkvøður fleiri enn Mofaz, men tað ljóðar, at ein atkvøðukassi við umleið 430 atkvøðum hvarv undir uppteljingini.

## Tekniskt brek við dómadagsmaskinuni

**Eitt brek við køliskipanini gjørdi, at serfrøðingarnir hjá CERN máttu sløkkja dómadagsmaskinuna**

Tann risastóra maskinan, sum ætlandi skal siga vísindini, hvussu alheimurin varð til, er steðgað orsakað av einum tekniskum breki. Ein 30 tons tungur transformatorur, sum verður brúktur í sambandi við eina køliskipan, gekk fyri. Tað bar í sær, at tað var ikki so kalt í royndartunlinum sum ásett, og tí bleiv avgjørt at sløkkja maskinuna, sigur CNN.

Tað eru tey, sum halda, at royndin í tunlinum á markinum millum Sveis og Frakland kann enda við einari vanlukku, soleiðis at Jørðin hvørvur í einum stórum, svørtum holi, og tí hevur útgerðin fingið navnið Dómadagsmaskinan.

Tey, sum vara av royndini, siga við CNN, at tann parturin av royndini, sum hevur elvt til orðaskifti og stúran, skuldi júst setast í gongd, tá tað tekniska óhappið gjørdi tað neyðugt at sløkkja maskinuna. Tey vænta, at maskinan fer aftur í gongd í dag ella í morgin.



*Dómadagsmaskinan mátti sløkkjast*
*Mynd: Polfoto*

## Russland verður meiri ágangandi í framtíðini

**Amerikanski uttanríkisráðharrin ávarar um, at Russland verður meiri ágangandi bæði úti og heima í framtíðini**

Condoleezza Rice heldur, at viðurskiftini millum Russland og Vesturheimin eru næstan líka spent sum undir Kalda krígnum.

Í einari røðu, sum hon helt í gjárkvøldið, segði Rice, at tann seinasta tíðin vísir, at russisku myndugleikarnir brúka sítt vald innanlands, samstundis sum teir eru vorðnir meiri ágangandi uttanlands.

Rice ávaraði Russland ímóti at reka ein politikk, sum kann avbyrgja landið frá umheiminum. Um Georgia-kreppuna segði hon, at teir dagarnir vóru daprir fyri Russland og heimin, men hon legði afturat, at USA fer ikki at slaka fyri Russlandi.

*Condoleezza Rice ávarar Russland*
*Mynd: Polfoto*



### STUTT SAGT

## Verk hjá Mozart undan kavi

Á einari skjaladeild á einum bókasavni í vesturfranska býnum Nantes eru fólk komin fram á eitt higartil ókent tónaverk hjá snillinginum Wolfgang Amadeus Mozart.

Ulrich Leisinger, sum er stjóri á Mozart-stovninum í Salzburg í Eysturríki, sigur við fjølmiðlarnar har, at tað er eingin ivi um, at tað er Mozart, sum hevur skrivað verkið, sum er funnið í Nantes. Talan er um eitt einstakt blað, sum helst er tað fyrsta uppskotið til eitt verk, og sambært stjóranum er blaðið sera virðismikið. Hann heldur, at Mozart skrivaði tað í 1787 ella fýra ár, áðrenn hann doyði.

Tey seinastu 50 árini eru tíggju týðandi verk hjá Mozart komin undan kavi ymsastaðni, og tey kønu halda, at vórðu hesi verkini lýst til sølu, hevði hvørt einstakt blað helst farið fyri einar 100.000 dollarar hvørt.



*Verk hjá Mozart koma framvegis undan kavi*
*Mynd: Polfoto*

## Semjan ein ósigur

Forsetin í Zimbabwe, Robert Mugabe, skal hava sagt sínum floksfeløgum í stjórnarflokkinum, at semjan, sum hann hevur gjørt við andstøðuna, er einki annað enn ein ósigur. Hann skal tó hava lagt afturat, at hann og flokkurin høvdu ikki annað í at velja, eftir sum andstøðan vann tjóðartingsvalið í vár, skrivar BBC.

Robert Mugabe og andstøðuleiðarin, Morgan Tsvangirai, skrivaðu fyrr í vikuni undir eina semju um, hvussu valdið í landinum skal býtast. Mugabe heldur fram sum forseti, og Tsvangirai verður forsætisráðharri. Eftir er at skipa og manna stjórnina, sum skal hava 31 ráðharrar.